

Tá seglið er strikað, sovnar Chiefurin.

„Nú rýma vit," teskar Baba til Sally Jones. "Annars tekur hann okkum kanska aftur til menniskjuni!"

So fara tær báðar apurnar inn í frumskógina. Baba syngur av gleði. Sally Jones er eisini glað. Men hon angrar, at tær ið hvussu er, ikki søgdu farvæl við Chiefin.

Baba og Sally Jones fara inn í landið, niðan í tey skógarklæddu fjøllini.

Baba sveiggjar seg, sum hon var von, ímillum trøini og leitar eftir búnum fikum, berum og mangofruktum. Hvørt kvøld byggir hann náttarbøli høgt uppi ímillum trækrúnurnar. Tað gera orangutangir fyri at kunna sova trygt, so hvørki leopardar ella veiðimenn við blásirøri og byrsu kunnu fáa fatur á teimum.

Sally Jones roynir at læra seg alt, sum Baba dugir. Tað er ikki lætt. Hon kennir seg klombruta og ørkymlaða. Alt í frumskógini er so nýtt og fremmant.

Ein dagin hitta Baba og Sally Jones ein flokk av orangutangum. Orangutangirnar taka ímóti Baba við opnum ørmum. Tær hava ongantíð fyrr sæð eina gorillu og ræðast tí Sally Jones eitt sindur í fyrstani, men tað javnar seg.

Baba og Sally Jones fara at fylgjast við orangutangunum. Allan dagin spælir Baba við hinar ungu apurnar í flokkinum. Tær kasta seg ímillum lianur og klænar greinar, sum bara orangutangur duga tað.



Baba hevur nóg mikið í sínum nýggju vinum. Hann gloymir, at Sally Jones nýtist hjálp til at henta fruktir og at byggja náttarbøli í teimum høgu trækrúnunum. Sally Jones má í staðin leita sær mat og finna sovistað nærri jørðini. Og har lúra nógvir vandar.

Eina nátt ringir ein kvalaraslanga seg inn í reiðrið hjá Sally Jones. Við neyð og deyð sleppur hon óskadd undan.

Orangutangurnar fara nú at halda, at Sally Jones er ein hóttan ímóti flokkinum, tí hon elur vandamikil djór upp á seg.



Høvdingin hjá orangutangunum er ein stórur og strangur gamal hannur. Hann greiðir Sally Jones frá, at hon hoyrir ikki heima ímillum orangutangurnar, og at hon ongantíð kann gerast ein av teimum. Fyri Babasa skyld má hon fara sín egna veg, sigur hann. Um Sally Jones ikki fer, verða bæði hon og Baba koyrd úr flokkinum.

Tá orangutangurnar halda fram morgunin eftir, verður Sally Jones verandi. Hon heldur, at Baba fer at koma aftur eftir henni, tá hann fær at vita, hvat er hent.

Men allur dagurin fer, og tann svarta tropiska náttin fellur aftur á. Sally Jones rópar vónleys út í myrkrið eftir Baba, men hann er longu langt burturi.

Nakrar dagar seinni finna nakrir villsvína-veiðimenn úr Dayak ættarbólkinum nærindis Sally Jones. Teir gerast ørkymlaðir. Dayakarnir vita alt um sína frumskóg, men eingin teirra hevur nakrantíð sæð eina apu sum Sally Jones. Teir taka hana við sær til leguna við Bengaloen ánna.

Sally Jones leggur ikki í at gera mótstøðu. Hon leggur ikki í nakað longur.